### Hvat heldur tú um hækkingina av ferðaseðlaprísum?

*Sosialurin hevur verið úti og spurt nøkur fólk, sum komu við St. Ola úr Suðuroy, hvat tey halda um hækkingina av ferðaseðlaprísunum*

FERÐASEÐLAR

*Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



**Oddmar Thomsen, lesandi**

– Eg haldi, tað er vánaligt. Sjálvur lesi eg til datamatikara í Havn, so eg sigli rættiliga nógv. Tað verður alt ov dýrt at fara við bili. Prísirnir skuldu heldur lækka enn hækka.



**Búgvi Joensen, sjómaður**

– Eg veit ikki rættiliga, hvat man skal siga. Hækkingin kann akkurát tað sama koma nú, sum at koma tá nýggja skipið kemur. Eg sigli við einum báti norðanfyri, so jú, tað verða til nakrar túrar um árið.



**Benjamin Johansen, kokkur**

– Hetta er forferdiligt. Vit sleppa næstan bíligari til Vágarnar við bili. Eg haldi, at vit skuldu heldur fingið bíligari ferðaseðlar og betri tænastu. Tænastan er nóg vánalig sum er, og so fáa vit eitt vánaligt skip fyri Smyril.

# Líka sum Smyril

**Magnus Hjelm, elektrikari umborð á St. Ola, sigur, at avloysaraskipið hjá Smyrli, er nakað tað sama at sigla við sum Smyrli**

SUÐUROYARLEIÐIN

*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjakvøldið fór St. Ola í sigling millum Havnina og Suðuroynna. Sum heild vísir tað seg, at bæði ferðafólk og manning eru væl nøgd við avloysaraskipið.

– Hetta skipið er nakað tað sama, sum at sigla við Smyrli. Størsti munurin er uppihaldsrúmini, sum eru betri umborð á hesum skipinum, sigur Magnus Hjelm, elektrikari umborð á St. Ola.



*Magnus Hjelm, elektrikari umborð á St. Ola, heldur, at avloysaraskipið er eins gott og Smyril*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Skipið er sama støðd sum Smyril, og siglir eisini nøkunlunda eins skjótt.

– Maskinaríið kundi verið betri. Skipið man vera eini 30 ár, og tí kundi tað verið eitt sindur betri hildið.

Magnus Hjelm er av teirri uppfatan, at ferðafólkunum dámar bara heilt væl hetta skipið. Sjálvur hevur hann bara hoyrt positiva umrøðu av St. Ola.

Eftir ætlan skal St. Ola avloysa Dúgvuna um Leirvíksfjørð, tá hon skal til eftirlit. Men fyribils verður St. Ola at síggja millum Havnina og Suðuroynna.

# Føroysk foreldur eru stundislig

**Børnini, sum eru á stovnum um dagarnar, meðan foreldrini eru til arbeiðis, verða altíð avheintað rættstundis. Sjálvsagt kemur tað fyri, at okkurt foreldur viðhvørt kemur ov seint, men tað er verri enn so ikki gerandiskostur, siga teir stovnarnir Sosialurin hevur tosað við**

DAGSTOVNAR

*Ingrid Bjarnastein*



*Føroysk foreldur møta stundisliga tá tað ræður um at fara eftir børnunum*

*Tilvildarlig mynd*

»Føroysk presisheit« verður ofta tikið til, tá eitt tiltak byrjar 10 minuttir ov seint, ella tá onkur kemur dettandi inn um hurðina eitt korter eftir, at viðkomandi skuldi møta. Men henda føroyska presisheitin er ikki nakað, ið hevur nervað føroysku dagstovnarnar, tí tey kenna næstan ikki til trupulleikan, at foreldur koma ov seint eftir børnunum.

Í Danmark vísir tað seg, at tað er vorðið til ein stóran trupulleika, tí børnini verða ikki avheintað til avtalaðu tíðina. Men hetta kenna stovnarnir í Føroyum lítið og einki til.

– Hetta er ongin trupulleiki hjá okkum, sigur Mona Rasmussen Mohr, leiðari á Barnagarðinum við Velbastaðvegin í Havn.

– Sjálvsagt kemur tað fyri, at foreldrini eru ov sein, men tað er ikki meira enn kanska eini 3-5 ferðir um árið. Sum oftast er talan um eina misskiljing millum foreldrini bæði, ella kanska okkurt ferðsluóhapp á veg eftir barninum.

### Ongin trupulleiki

Fríðgerð Sundsskarð, leiðari í dagstovninum Lítlaskógi í Dj. í Geilsgøtu í Havn, sigur júst tað sama.

– Hetta er ongin trupulleiki í Lítlaskógi. Stovurnar eru mangan tómar áðrenn vit lata aftur. Onkuntíð er onkur misskiljing komin í, og so verða foreldrini ov sein, sigur Fríðgerð Sundsskarð.

Lítliskógur hevur seks stovur og 90 børn tilsamans, og sigur Fríðgerð, at tað eru bara nøkur heilt fá, sum eru til klokkan er farin av fimm.

Í Føroya næststørstu kommunu hava tey heldur ongar trupulleikar við, at foreldur koma ov seint eftir børnunum.

Hanna Thøgersen, leiðari í Mylnuhúsinum í Klaksvík, sigur, at heldur ikki har eru tey plágað av, at foreldrini eru ov sein.

– Tað kemur sjálvsagt fyri, men tað er sjáldan. Vit hava nú opið til klokkan 17.30, men um vit so høvdu havt opið til klokkan 19, so hevði tað eisini komið fyri, at foreldur koma ov seint. Nú er tað eisini soleiðis, at tá tú býrt í Klaksvík og mamman skal yvirum Leirvíksfjørð, og báturin er seinkaður, so ger tað jú eisini mun, men hetta er als ikki nakað vit hava trupulleikar við, leggur Hanna Thøgersen dent á.

Heldur ikki í Runavík kenna tey til trupulleikan.

– Gjøgnumgangandi halda foreldrini væl tíðirnar, so tað er ikki nakar trupulleiki her, sigur Fríða Helmsdal, leiðari á Kongshavnar barnagarði í Runavík.

– Onkur kemur sjálvandi viðhvørt ov seint, men tað er ikki ein dagligur trupulleiki her.

So sjálvt um donsk foreldur ikki koma rættstundis eftir børnunum, so kann ein staðfesta, at føroysk foreldur eru røsk at møta til tíðina, tá tað ræður um at fara eftir børnunum.



# Óheppin príshækking

**Jákup Mikkelsen, stjóri á JFK Heilsølu og tingmaður fyri Fólkaflokkin í Norðuroyggjum, heldur, at tað er sera óheppið, at ein príshækking hjá Strandferðsluni einans rakar ávís øki av landinum**

PRÍSHÆKKING

*Solby A. Eliasen*



*- Príshækkingin er bíligari enn bíðitíðin, heldur Jákup Mikkelsen, vinnulívs- og tingmaður, sum her er avmyndaður, tá hann var á veg umborð á Sam*

**Klaksvík:** Príshækkingin hjá Strandferðsluni fer ikki at raka siglingina til tær smærru oyggjarnar. Tað fegnast Jákup Mikkelsen um, men hann sigur samstundis, at tað er sera óheppið, at tað verða tey, sum nýta Suðuroyarleiðina, Leirvíksfjarðarleiðina, Sandoyarleiðina og Bygdaleiðir, sum koma at rinda fyri hækkingina hjá Strandferðsluni.

- Tað er sera óheppið, tá ein tílík príshækking rakar ávís øki og partar av vinnulívinum, sigur Jákup, men hann vísir tó á, at um prísirnir hjá Strandferðsluni høvdu fylgt økingini í kostnaðarstiginum, sum hevur verið seinnu árini, so høvdu teir verið eini 45 % hægri enn teir í veruleikanum eru í dag.

Tí heldur hann, at ein øking upp á umleið 20 %, sum talan er um, ikki kemur at gera so ilt, sum tað møguliga kundi væntast.

- Eg dugi væl at síggja, at tað er óheppið, at tað í hesum førinum verður útjaðarin og vinnulívið har, sum kemur at bløða, men fyri okkum norðoyingar verður hesin trupulleikin ikki galdandi so longi afturat, sigur ein sera bjartskygdur tingmaður, sum væntar, at tað verður koyrandi um Leirvíksfjørð innan fyri tey komandi 2 til 2 1/2 árini.

### Prísirnir

Jákup Mikkelsen heldur, at Strandferðslan átti at hugt nærri eftir sínari innkrevjing. Tí hann heldur, at børn undir 14 ár, sum í dag rinda hálvan ferðaseðil áttu at sloppið ókeypis. Síðani áttu tey at goldið hálvan ferðaseðil til tey eru 18 og eftir tað skuldu tey goldið fullan ferðaseðil.

- Eg havi ikki gjørt nakra útrokningar upp á hetta, men tað kundi so avgjørt verið áhugavert at sæð, hvussu ein tílík broyting hevði ávirkað inntøkurnar hjá Strandferðsluni, nú prísirnir aftur fara at hækka, sigur Jákup Mikkelsen, sum heldur, at tað uttan iva hevði havt við sær, at fleiri barnafamiljur høvdu ferðast meira.

Jákup Mikkelsen er stjóri á JFK Heilsølu, og hann viðgongur, at príshækkingin fer at merkjast væl hjá teimum, men samstundis sigur hann, at bíðitíðin bæði í Klaksvík og Leirvík er minkað munandi, síðani Sam byrjaði at sigla um fjørðin eisini.

- Og tá Ternan so kemur at sigla í staðin fyri Sam, tá verður munurin so avgjørt uppaftur størri, heldur Jákup Mikkelsen.

Men Strandferðslan skal spara einar 7, 5 milliónir, og spurdur um, hann veruliga trýr upp á, at Ternan fer at koma at sigla um Leirvíksfjørð ístaðin fyri Sam, svarar Jákup ógvuliga sannførdur, at hann ikki heldur, at tað fer at kosta meira at hava Ternuna siglandi saman við Dúgvuni enn Sam.

Eins og aðrir vinnulívsmenn í Norðoyggjum søgdu í blaðnum í gjár, so heldur Jákup Mikkelsen eisini, at tað er av størsta týdningi at sleppast kann undan bíðitíðini, tí tað er hon, sum kostar mest fyri vinnulívið.

- Bíðitíðin er so avgjørt nógv dýrari enn ein príshækking, sigur Jákup Mikkelsen at enda.

## Norðoya Listafelag aðalfund

**Leygardagin hevur Norðoya Listarfelag aðalfund í Mikladali**

AÐALFUNDUR

*Solby A. Eliasen*

Bernhardina Klein, forkvinna í Norðoya Listafelag, er lærari í Mikladals skúla, og hon hevur tikið stig til, at fundurin skal verða í bygdini leygardagin.

- Tað er tað sama hjá Listafelagnum, sum hjá øllum øðrum. Tað koma alt ov fá til aðalfund, og tí hugsaði eg at royna at gera okkurt øðrvísi hesuferð. Og tað riggaði, tí væl fleiri hava teknað seg enn tað plaga at møta upp til fundirnar hjá okkum, so tað er bara gott, sigur Bernhardina.

Hetta verður sostatt til ein heildagstúr hjá teimum, sum hava teknað seg til, tí Bernhardina og restin av nevndini hava valt at leggja seg eftir ferðaætlanini hjá Barsskor, sum røkir siglingina um Kalsoyarfjørð.

- Tey koma her um hálvgum tíggju tíðina leygarmorgunin og fara avstað aftur um sekstíðina, so tað verður ymiskt annað á skránni enn bara fundurin, greiðir Bernhardina frá. Hon vónar, at tað veðrið verður gott, tí so er møguleiki fyri onkrum túri á oynni.

Onkur av teimum, sum hava teknað seg, hava ikki verið á Kalsoynni áður, so tað er ein góður møguleiki hjá teimum at síggja oynna.

- Eg helt, at aðalfundurin kundi líka so væl verða her, sum í Klaksvík. Tí tað er jú Norðoya Listafelag og ikki Klaksvíkar Listafelag, vísir Bernhardina á, og hon leggur at enda afturat, at onki serligt mál er á skránni fyri aðalfundinum.


Góðir brúktir bilar

Nissan Almera 1.5 Comfort
grátur, árg. 2000,
5 hurðar, km. 52.000
112.000

Opel Astra 2.0DT
grønur, árg 2001,
5 hurðar, km. 38.000
175.000

Nissan Almera 2.0 D GX
grønur, árg. 1996,
5 hurðar
89.000

Opel Vectra 1.8
svartur, árg 1996,
4 hurðar, km. 80.000
122.000

Peugeot 106 Diesel
grátur, árg 1995,
3 hurðar, km. 60.000
85.000

Opel Vectra 1.7 Diesel
reyður, árg 1995,
4 hurðar, km. 118.000
76.000

Peugeot 306 Diesel 1.9 AC
bláur, árg 1999,
4 hurðar, km. 61.000
125.000

Opel Vectra 2.0 Diesel
bláur, árg 1997,
5 hurðar
125.000

Peugeot 406 ST 2.0 Hdi
vínreyður, árg 1999,
4 hurðar, km. 120.000
164.000

Saab 9-3 TiD
bláur, árg 2000,
5 hurðar, km. 67.000
208.000

Opel Astra 1.7
brúnur, árg 1996,
4 hurðar
75.000

Audi A4 Tdi
bronze, árg 1995,
4 hurðar, km. 155.000
130.000

Opel Astra 2.0 Dti
svartur, árg 1999,
5 hurðar, km. 36.000
138.000

Ford Courier 1.8 Diesel Van
hvítur, árg 2000,
3 hurðar
78.000

Opel Astra 1.7DT Van
bláur, árg 1998,
5 hurðar, km. 82.000
78.000

Ford Escort 1.6
grønur, árg 1995,
4 hurðar
52.000

Ford Escort 1.8 Diesel
grønur, árg 1995,
4 hurðar, km. 152.000
65.000

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3071 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61


# Nýggi hvalbiartrolarin klárur um ein mánaða

**Í gjár vóru hvalbingar á veg til Føroyar við nýggjum trolara, teir hava keypt úr Íslandi. Hann skal nú á beding, áðrenn hann fer til fiskiskap**

SKIPSKEYP

*Áki Bertholdsen*



*Nýggi hvalbiartrolarin hevur fingið navnið Sjaðaklettur, men um tað verður endaliga navnið, er ikki heilt greitt enn*

**Hvalba:** Í gjár vóru hvalbingar á veg til Føroyar við trolarunum, sum teir hava keypt úr Íslandi.

Tað er íslendski trolarin, Dala- Rafn, úr Vestmannaoyggjum, sum hvalbingar nú hava keypt.

Tað eru menninir aftanfyri djúpvatnstrolaran, Steintór, sum nú keypa ein trolara afturat.

Felagið, sum eigur nýggja trolaran, nevnist Sjaðaklettur og Sjaðaklettur er eisini navnið, teir hava givið nýggja trolaranum, í hvussu so er fyribils.

Mikkjal Hammer, vanliga nevndur Mikki, er reiðari á nýggja trolaranum og hann var við yviri í Íslandi eftir trolaranum og væntandi skuldu teir verða í Føroyum í gjárkvøldið.

Ein annar av oddamonnunum, Jákup Pauli Hammer, sum er skipari á Steintór, sigur teir hava leingi leitað eftir einum hóskandi trolara, bæði í Íslandi, Onglandi, Týsklandi og í Noregi.

Fyri nøkrum árum síðani keyptu teir á Steintór fiskiloyvið hjá djúpvatnstrolaranum, Beintu, av Tvøroyri, tá ið hon varð seld av landinum, og nú hava teir so fingið ein trolara at brúka tað fiskiloyvi.

Sjaðaklettur er ein djúpvatnstrolari, sum líkist Mýlingi. Hann er bygdur í 1975, men reiðarin á Steintóri sigur, at hann er væl hildin. Maskinorkan er er 1500 hestar.

Hann kostar fýra milliónir at keypa við reiðskapi, men tað er rættiliga nógv at gera við hann, áðrenn hann verður góðkendur og klárur at fara til fiskiskap.

Jákup Pauli Hammer væntar, at trolarin fer at standa teimum í 10 milliónum, tá ið hann verður klárur at fara til fiskiskap. Hann segði stutt fyri evstamark í gjár, at Sjaðakelttur væntandi fer á beding á Skála, har tað verður gjørt við hann, sum skal og hann væntar, at hann verður klárur at fara til fisksikap um ein mánaða.

Hann fer at avreiða, har prísurin er bestur og tað vóna teir, verður til flakavirkið í Hvalba